ETISKA RÁÐIÐ

# Ársfrágreiðing 2022

Etiska ráðið

Etiska ráðið

J.H. Schrøters gøta 7

100 Tórshavn

Føroyar

Tlf: + 298 219484

T-postur: er@er.fo

www.etiskaradid.fo

Ársfrágreiðingin er teldutøk á heimasíðuni.

Mars 2023

# Innihald

Formæli ..... 4

Um Etiska ráðið ..... 5

Uppgávan hjá Etiska ráðnum ..... 5

Setan av ráði og hvør situr í ráðnum ..... 5

Ráðslimir til 31. september 2022 ..... 6

Ráðslimir frá 1. oktober 2022 ..... 8

Fyrisiting ..... 10

Heilsumálaráðið ..... 10

Formaður ..... 10

Reglugerðin ..... 10

Skrivstovan ..... 10

Etisk evni ..... 11

Vælferðartøkni og etikkur ..... 11

Kyn og etikkur ..... 11

Fosturtøka ..... 12

Innkomin mál ..... 12

Hoyringamál ..... 12

Mál frá borgarum o.ø. ..... 12

Virksemi ..... 13

Fakligt samstarv og menning ..... 13

Astrid Højgaard framløga ..... 13

Bjørt Lind framløga ..... 13

NCBio ..... 13

NEC ..... 13

Ráðstevna hjá Javna og Parasport ..... 13

Onnur etisk ráð og nevndir ..... 14

Útgávur og miðlan .......... 15
Ársfrágreiðing 2021 .......... 15
Heimasíðan .......... 15
Facebook .......... 15
Etiska ráðið í miðlum .......... 15
Fundarvirksemi .......... 15
Luttøka uttanhýsis .......... 16
Fyrisitingin .......... 16
Skrivstovuhøli .......... 16
Fíggjarstøða .......... 16
Ætlanir 2023 .......... 16
Samanumtøka .......... 16

# Formæli

Ársfrágreiðingin lýsir virksemið hjá Etiska ráðnum farna árið, hvørji evnir, ráðið hevur arbeitt við, og hvussu ráðið hevur arbeitt fyri at røkka sínum endamáli.

1. januar 2022 eru tað fimm ár síðani, at Etiska ráðið fór til verka. Farna árið hevur verið merkt av, at Etiska ráðið fyrst hevur verið í eini bíðistøðu, og síðani av stórum útskiftingum í ráðnum. Eftir ætlan skuldu ráðslimir skiftast út fyrst í árinum, men hetta bleiv ikki til nakað fyrrenn 1. oktober 2022. Meðan ráðið var í bíðistøðu vildi tað ikki seta ov nógv nýggj tiltøk í verk, fyri ikki at binda komandi nevndina.

Tá nevndarlimirnir vórðu skiftir varð endin, at 7 av nýggju limum, íroknað formaðurin, vóru nýggj. Stutt eftir bað fakligi skrivarin um at vera loystur úr starvið. Tískil hevur fyrsta tíðin hjá nýggju nevndini verið merkt av, at seta seg inn í hvørjum Etiska ráðið arbeiðir við, hvørjar heimildir ráðið hevur, og so at seta nýggjan fakligan skrivara í starv.

Etiska ráðið hevur serliga arbeitt við trimum evnum farna árið. Fyrsta hálvárið var fokus á vælferðartøkni og etikk. Tilgjørt vit (AI), tólmenni, appir, og telduforrit kunnu lætta nógv um í gerandisdegnum. Tey kunnu hjálpa fólki, ið hava avbjóðingar, at vera sjálvbjargin og at vera virkin og luttakandi í samfelagnum. Hetta kann somuleiðis leysgeva arbeiðsorku á røktarheimum og øðrum stovnum. Hinvegin geva tólini eisini nógvar etiskar avbjóðingar, so sum hvussu er við sambandinum millum menniskju, um tólini fylla meira, hvussu ein tryggjar at brúkarin verður tikin við uppá ráð, og hvussu er við eftirliti og samtykki.

Etiska ráðið arbeiddi somuleiðis við kyni og etikki. Ráðið fekk kunning uttanífrá, tá um ræður evni sum transkynd og um sexual undirvísing. Ráðið sendi eisini eina umsókn inn til Nordisk jämställdhetsfond um at skipa fyri eini ráðstevnu, ið skuldi føra til meira samstarv millum Norðurlendsku ráðini um kyn og etikk. Umsóknin varð tó ikki gingin á møti.

Ætlanin var at skipa eina ráðstevnu um fosturtøku í november mánaði, og var tað tískil eitt afturvendandi evni hjá Etiska ráðnum farna árið. Ráðstevnan bleiv tó útsett til 2023, so nýggja nevndin hevði betri umstøður at fyrireika ráðstevnuna.

Árið hevur sostatt verið merkt av nakað av óvissu og nógvum útskiftingum, men samstundis hevur nógv virksemi verið í ráðnum, við umrøðu av etiskum spurningum, fundum, luttøku í miðlunum og so framvegis. Nógv av tí Etiska ráðið hevði sett sær fyri at gera í 2022, verður hol av álvara sett á í 2023.

Bergur Debes Joensen, formaður

# Um Etiska ráðið

## Uppgávan hjá Etiska ráðnum

Etiska ráðið er sett at virka samsvarandi løgtingslóg nr. 70 frá 29. mai 2017 um Etiskt ráð.

Etiska ráðið skal fremja og styrkja kjak og vitan um etiskar spurningar, ið knýta seg til heilsufakligt virksemi á heilsuøkinum, almannaøkinum og kommunala økinum. Hetta verður m.a. gjørt við at skipa fyri ráðstevnum, evnisdøgum og kjakfundum fyri at varpa ljós á aktuellar etiskar spurningar.

Etiska ráðið skal ráðgeva løgtingi, landsstýrinum og almennum myndugleikum í etiskum spurningum. Etiska ráðið hevur skyldu til at fylgja menningini á tí bio- og ílegutekniska økinum og hevur til uppgávu at ráðgeva í etiskum spurningum viðvíkjandi gransking í og nýtslu av bio- og ílegutøkni.

Ráðið virkar óheft og velur sjálvt tey evnir og teir spurningar, tað tekur til viðgerðar. Tað er ikki krav, at Ráðið er samt í sínum niðurstøðum um ávís etisk evnir. Heldur er umráðandi at lýsa ávísu evnini úr ymiskum sjónarhornum, og búgva almenningin og tey, sum skulu taka støðu til tey ymsu evnini, til víðari kjak og støðutakan.

Ráðið skal lata úr hondum minst eina frágreiðing um árið.

## Setan av ráði og hvør situr í ráðnum

Í lóggávuni er ásett, at tað er landsstýrismaðurin í heilsu- og innlendismálum, sum setur limirnar í Etiska ráðnum. Etiska ráðið hevur níggju limir, ið verða settir fyri fýra ár í senn. Tilnevningin verður gjørd eftir ávísum reglum, soleiðis at landsstýrismaðurin í heilsu- og innlendismálum tilnevnir formannin í ráðnum, umframt ein lim. Harumframt tilnevnir landsstýrismaðurin í heilsu- og innlendismálum tríggjar limir eftir tilmæli frá landsstýrismonnunum í ávikavist almannamálum, vinnumálum og mentamálum, ein lim eftir tilmæli frá Kommunufelagnum og tríggjar limir eftir tilmæli frá politisku flokkunum, ið hava umboð á løgtingi.

Tey, ið verða tilnevnd í ráðið, skulu hava innlit í etisk, mentanarlig, samfelagslig og faklig viðurskifti, ið hava týdning fyri virksemið hjá ráðnum. Limir í ráðnum kunnu ikki sita á løgtingi ella í kommunustýri.

Limirnir verða sitandi í ráðnum, til nýggir limir eru tilnevndir. Tá ið ráðið verður sett av nýggjum, verður miðað eftir, at í minsta lagi tríggir limir frá undanfarna valskeiði verða sitandi eitt valskeið afturat. Limir kunnu verða settir av nýggjum eina ferð.

Landsstýrismaðurin í heilsu- og innlendismálum skal tryggja, at ráðið verður samansett við fólki við fjølbroyttum útbúgvingum og royndum, og at umleið eins nógvir limir av báðum kynum eru umboðað.

## Ráðslimir til 31. september 2022



**Anne Mette Greve Klemensen**
Sóknarprestur í Suðurstreymoyar prestagjaldi.

Tilnevnd forkvinna í 2020 av landsstýrismanninum í heilsumálum.



**Ann Danielsen**
Serlækni í gynækologi/obstetrik. Starvast sum lækni í kvinnusjúkum á Landssjúkrahúsinum.

Tilnevnd í 2019 av landsstýriskvinnuni í heilsumálum.



**Jógvan D. Hansen**
Cand.phil. Starvast sum lærari í heimspeki.

Tilnevndur í 2018 eftir tilmæli frá politisku flokkunum á løgtingi.



**Richard Schwartson**
MSc (Pharm) og MSc (IT). Starvast sum KT-leiðari í Apoteksverkinum.

Tilnevndur í 2018 eftir tilmæli frá politisku flokkunum á løgtingi.



**Sólbjørg Frederiksberg**
Fysioterapeutur. Starvast á fysioterapideildini á Landssjúkrahúsinum.

Tilnevnd í 2018 eftir tilmæli frá politisku flokkunum á løgtingi.



**Jákup H. Foldbo**
Cand.scient.soc. Starvast sum trivnaðarleiðari í Runavíkar kommunu.

Tilnevndur í 2018 eftir tilmæli frá Kommunufelagnum.



**Leif Olsen**
Sosialráðgevi. Starvast sum ráðgevi í Almannaverkinum.

Tilnevndur í 2018 eftir tilmæli frá landsstýriskvinnuni í almannamálum.



**Debes H. Christiansen**
Cand.scient. Deildarleiðari á Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

Tilnevndur í 2018 eftir tilmæli frá landsstýrismanninum í vinnumálum.



**Marjun Bæk**
Cand.theol. Fyrrverandi sóknarprestur og sjómansprestur.

Tilnevnd í 2018 eftir tilmæli frá landsstýriskvinnuni í mentamálum.

## Ráðslimir frá 1. oktober 2022



**Bergur Debes Joensen**
Sóknarprestur í Suðurstreymoyar prestagjaldi.

Tilnevndur formaður í 2022 av landsstýrismanninum í heilsumálum.



**Katrin Kallsberg**
Serlækni í gynækologi/obstetrik. Starvast sum lækni í kvinnusjúkum á Landssjúkrahúsinum.

Tilnevnd í 2022 av landsstýrismanninum í heilsumálum.



**Jógvan D. Hansen**
Cand.phil. Starvast sum lærari í heimspeki.

Tilnevndur í 2018 (seinna seta frá 2022) eftir tilmæli frá politisku flokkunum á løgtingi.



**Arni Zachariassen**
Cand.theol. Rúsviðgeri á Bláakrossheiminum.

Tilnevndur í 2022 eftir tilmæli frá politisku flokkunum á løgtingi.



**Súsanna Mortensen**
Námslektari í sjúkrarøktarfrøði. Starvast á Fróðskaparsetrinum.

Tilnevnd í 2022 eftir tilmæli frá politisku flokkunum á løgtingi.



**Jóngerð Guttesen**
Master of Public Governance. Starvast sum leiðari í Roðanum.

Tilnevnd í 2022 eftir tilmæli frá Kommunufelagnum.



**Leif Olsen**
Sosialráðgevi. Starvast sum ráðgevi í Almannaverkinum.

Tilnevndur í 2018 eftir tilmæli frá landsstýriskvinnuni í almannamálum.



**Noomi Gregersen**
Cand.scient í mýlalívfrøði. Verkætlanarleiðari í Fargen.

Tilnevnd í 2022 eftir tilmæli frá landsstýrismanninum í vinnumálum.



**Marjun Asbjarnardóttir Lómaklett**

Sóknarprestur í Norðoya vestara prestagjaldi og integratiónsprestur.

Tilnevnd í 2022 eftir tilmæli frá landsstýriskvinnuni í mentamálum.

# Fyrisiting

## Heilsumálaráðið
Heilsumálaráðið umsitur lógina, sum Etiska ráðið virkar eftir. Heilsumálaráðið er ovasti fyrisitingarligi myndugleiki hjá Etiska ráðnum, og veitir ráðnum løgfrøðiliga og aðra ráðgeving, tá ið tørvur er á tí. Heilsumálaráðið umsitur eisini bókhald og roknskap fyri Etiska ráðið.

## Formaður
Formaður fyri Etiska ráðið er Bergur Debes Joensen, sum tók við sessinum 1. oktober 2022. Formaðurin leiðir fundirnar í ráðnum, og tað er hann, sum úttalar seg alment vegna ráðið. Formaðurin fær samsýning, sambært galdandi reglum.

## Reglugerðin
Etiska ráðið virkar eftir reglugerð, har ásett er, hvussu ráðið starvast samsvarandi § 6, stk. 7 í løgtingslóg um Etiskt ráð.

## Skrivstovan
Á skrivstovuni hjá Etiska ráðnum starvast fakligur skrivari hálva tíð. Uppgávan hjá skrivstovuni er at tæna Etiska ráðnum at røkja sína uppgávu, sum er at fremja og styrkja kjak og vitan um etiskar spurningar, ið knýta seg til heilsufakligt virksemi á heilsuøkinum, almannaøkinum og kommunala økinum, og at gera almennar myndugleikar og borgarar betur førar fyri at taka støðu í etiskum spurningum.



Fakligur skrivari í 2022 var Arnbjørn Ó. Dalsgarð, cand.mag. í heimspeki í verki (Applied Philosophy), settur í 2020 eftir tilmæli frá Etiska ráðnum.

Fakligi skrivarin legði til rættis ráðsfundirnar saman við forkvinnuni, og hevur um hendi dagliga virksemið á skrivstovuni.

Uppgávan er harumframt m.a. at savna inn tilfar og greina tilfarið fyri ráðið.

Etiska ráðið leigar høli til skrivstovu, fundir og annað virksemi í Smæruni, J.H. Schrøters gøtu 7, FO-100 Tórshavn.

# Etisk evni

Í 2022 hevur Etiska ráðið av sínum eintingum serliga arbeitt við trimum evnum, sum eru:

- Vælferðartøkni og etikkur
- Kyn og etikkur
- Fosturtøka

Harafturat hevur ráðið arbeitt við málum, sum tað hevur fingið til hoyringar frá myndugleikunum í sambandi við lógararbeiði, og málum, sum fólk, feløg, miðlar og onnur hava heitt á ráðið um at taka upp.

## Vælferðartøkni og etikkur

Vælferðartøkni er av álvara vorðin ein týðandi partur av okkara lívi. Vit tosa her um tøkni við tilgjørdum viti (AI, Artificial intelligence), so sum tólmenni (robottar), appir og telduforrit, sum kunnu lætta um í gerandisdegnum. Tøkni, sum ger fólk betur før fyri at vera virkin, røra seg, taka lut og at klára seg sjálvi, ikki minst teimum, ið tørva røkt, antin tað er í egnum heimi, á røktarheimi ella øðrum stovni. Vælferðartøkni kann soleiðis eisini vera við til at leysgeva arbeiðsorku, samstundis sum hon kann betra um trygd og lívsgóðsku hjá borgarunum.

Men við vælferðartøkni stinga nógvir etiskir spurningar seg eisini upp. Hvussu ávirkar tað sambandið millum menniskju, tá ið tøkni og tøkniskipanir yvirtaka partar av røktini? Ber tað til at siga nei til vælferðartøkni, sum verður boðin einum, og fáa okkurt annað í staðin? Hvussu tryggja vit, at brúkarin verður hoyrdur og tikin við upp á ráð? Hava vit loyvi til at hava eftirlit við fólki gjøgnum tøkniskipanir, um tey ikki sjálvi hava givið sítt samtykki? Hvør hevur ábyrgdina fyri, at vælferðartøknin riggar sum hon skal? Og hvør hevur ábyrgdina, tá okkurt gongur galið?

Fyri at kasta ljós á so nógvar etiskar spurningar, sum til ber, og skapa kjak um teir, skipaðu Etiska ráðið og Sjúkrarøktaretiska ráðið í felag fyri einum tiltaki um vælferðartøkni og etikk týsdagin 7. juni. Tiltakið varð skipað soleiðis, at umboð fyri mennarar, veitarar, brúkarar og onnur fingu høvi til lýsa evnið "Etikkur og vælferðartøkni" úr sínum sjónarhorni, við stuttum framløgum, sum vórðu stroymdar beinleiðis og sjónbandaðar til útgávu á heimasíðuni.

## Kyn og etikkur

Serliga fyrru helvt av 2022 hevði Etiska ráðið nógv fokus á spurningar kring kyn og etikk. Ráðið fekk kunning um evnið uttanífrá, við fokusi á t.d. spurningin um transkynd, og løgligu og samfelagsligu viðferðina av transkyndum, eins væl og sexual undirvísing.

Etiska ráðið fekk staðfest, at tað hevur møguleikan at søkja stuðul frá Nordisk jämställdhetsfond til átøk um etikk og kyn/javnstøðu. Ráðið søkti um stuðul úr grunninum. Ætlanin var at skipa fyri einum norðurlendskum fundi í Føroyum millum limir úr etisku ráðunum í Norðurlondum, har ein skuldi kjakast, upplýsa og deila vitan um, hvussu til ber at arbeiða etiskt við evnum sum kyni, kynsligum samleika og javnstøðu, og kanna møguleikarnar fyri at gera eitt netverk innan økið. Umsóknin var tó ikki gingin á møti, og bleiv tískil ikki til nakað í hesum umfarinum.

## Fosturtøka

Etiska ráðið arbeiddi so at siga alt árið við at skipa fyri eini ráðstevnu um fosturtøku. Ætlanin var at hava tiltakið í 2022, men tí at meginparturin av nevndini varð skift út, so avgjørdi ráðið at bíða við ráðstevnuni til 2023.

## Innkomin mál

### Hoyringamál

Etiska ráðið fekk í 2022 5 lógaruppskot og kunngerðir til hoyringar, og svaraði 3 teirra skrivliga. Hoyringarsvarini eru at finna á heimasíðuni hjá ráðnum. Annað tilfar í sambandi við málini er at finna á heimasíðunum hjá Føroya Løgtingi, Løgmansskrivstovuni og avvarðandi ráðum.

*Kynslig brotsverk*

Hoyringarsvar, jan. 19, 2022

*Løgtingslóg um Fólkaheilsustýrið*

Hoyringarsvar, jan. 31, 2022

*Almannatrygd og tænastur*

Hoyringarsvar, feb. 11, 2022

*Kunngerð um medisinska útgerð*

Etiska ráðið hevði ongar viðmerkingar til uppskotið.

*Heimild at taka ímóti peningaupphædd frá Novo Nordisk Fonden*

Etiska ráðið sendi Fíggjarnevndini kunnandi tilfar og luttók á fundi 5. september 2022.

*Fundur um uppskot til koppsetingarætlan*

7. mars var Etiska ráðið á fundi við Heilsumálaráðið at umrøða eitt uppskot um koppsetingarætlan. Ráðið førdi fram, at tað eigur at vera upp til hvønn einstakan at gera av, hvørt ein vil koppsetast ella ikki, og at tann avgerðin skal byggja á eitt upplýst grundarlag, ið ein hevur havt møguleika at reflektera um.

## Mál frá borgarum o.ø.

*Sammøður*

Ein borgari heitti á Etiska ráðið um at taka til viðgerðar málið um sammøður. Borgarin vildi serliga hava, at Etiska ráðið hugdi at rættindum hjá børnum og foreldrum.

### *Hugburður til flóttafólk*
Ein fyrispurningur kom frá einum borgara viðvíkjandi hugburðin føroyingar hava til flóttafólk. Her var serliga hugsað um, at har sambært spurnarkanning er stórur munur á, hvat føroyingar meina um at taka ímóti flóttafólki, alt eftir hvar tey eru frá.

### *Trupulleikar av talgildum samleika*
Ein áheitan kom frá einum borgara til Etiska ráðið um at taka upp og viðgera støðuna hjá fólki, sum ikki kunnu ella ikki vilja hava talgilda samleikan. Hesi skulu í mongum førum rinda fyri tænastur, sum tey, ið hava talgilda samleikan sleppa undan, og borgarin heldur ikki, at hetta er rætt

# Virksemi

## Fakligt samstarv og menning

### Astrid Højgaard framløga
Astrid Højgaard, serlækni á Aalborg Universitetshospital, hevði netframløgu fyri Etiska ráðnum 7. juni. Evnið var "Kyn í einum søguligum ljósi", har hon greiddi frá hvussu løgfrøðin og hugburðurin til kyn er broytt seinastu árini. Eitt serligt fokus í so máta var transkynd og transkynd børn, og at tað hevur verið gagnligt fyri sálarheilsuna hjá transkyndum í Danmark og aðrastaðni, tá tey hava fingið betri rættindi og viðgerðir.

### Bjørt Lind framløga
Bjørt Lind var inni 29. apríl at kunna um virksemi hjá felagnum Kyn. Fokus var serliga á hvussu Kyn upplýsir og undirvísir næmingum í miðnám um kyn og kynslív, hvørjar (etiskar) avbjóðingar Kyn kann møta í sínum virksemi, og hvussu móttøkan av undirvísingini hevur verið.

### NCBio
Føroyar hava ein eygleiðara í Norðurlendsku nevndini fyri bioetikk, stytt NCBio (Nordic Committee on Bioethics), sum millum annað skipar fyri tiltøkum til at stuðla undir norðurlendskt samstarv og kjak um bioetiskar spurningar. Arnbjørn Ólavsson Dalsgarð, fakligur skrivari hjá Etiska ráðnum, ið var føroyski eygleiðarin, luttók í tí sambandi á tveimum tiltøkum hjá NCBio. Eitt um Veðurlagsbroytingar og fólkaheilsu í etiskum høpi, og eitt um heimsfarsóttaretikk og hvat vit í Norðurlondum hava lært eftir Korona.

### NEC
Landsumfevnandi etisk ráð og nevndir í Europa samstarva í National Ethics Councils Forum, sum er eitt forum, sum verður hildið minst eina ferð árliga. Ársfundur og ráðstevna var í París 12 – 13. mai. Fakligi skrivarin luttók umvegi netið.

### Ráðstevna hjá Javna og Parasport
Javni skipaði saman við Parasport fyri eini heilsuráðstevnu, har fokus var á fólk við menningartarni. Tiltakið í Smæruni tann 11. november. Bergur Debes Joensen, formaður, hevði eitt uppleg um etisk sjónarhorn á heilsu og sjálvavgerðarrætt, og Súsanna Mortensen, limur í Etiska ráðnum, luttók í panelinum aftan á.

## Onnur etisk ráð og nevndir

Etiska ráðið skal sambært lógini samstarva við onnur etisk ráð og etiskar nevndir. 12. desember í 2022 var aftur fundur við Sjúkrarøktaretiska ráðið og Siðfrøðinevndina hjá Føroyskum Sálarfrøðingum, har tosað varð um møguleikar fyri samstarvi. Forkvinnan luttók eisini á ráðstevnu í Keypmannahavn 21. apríl: Etik som vejviser i AI-landskabet", ið Nationalt Center for Etik skipaði fyri. Boðskapurin á ráðstevnuni var, at vit eiga at verja rættin til frælsi, rættin til privatlív, og rættin til at siga nei. Fólkið skal stýra tøknini, heldur enn tøknin stýra fólkinum. Á ráðstevnuni tosaði forkvinnan við formannin í Det Etiske Råd og leiðaran fyri National Center for Etik, og bæði vóru áhugaði í, at samstarva við Etiska ráðið í Føroyum.

## Útgávur og miðlan

### Ársfrágreiðing 2021

Etiska ráðið gav í februar 2022 út *Ársfrágreiðing 2021*.

### Heimasíðan

Heimasíðan hevur so hvørt verið dagførd í 2022. Nýtt tilfar, tíðindi, og upptøkur frá tiltaki vóru løgd út á heimasíðuna.

### Facebook

Ráðið hevur í nøkur ár havt sín egna vanga á Facebook, og hevur so hvørt lagt kunnandi tilfar út á síðuna í 2022.

### Etiska ráðið í miðlum

Etiska ráðið hevur á ymsan hátt verið miðlað í bæði føroyskum og útlendskum miðlum í 2022.

*Heilsan á kvinnudegnum – Konur og kanónir*

Grein eftir Anne Mette Greve Klemensen, forkvinnu í Etiska ráðnum, á etiskaradid.fo 8. mars

*Etikkur og tøkni*

Anne Mette Greve Klemensen, forkvinna í Etiska ráðnum, í Góðan Morgun Føroyar í KvF 07. juni 2022.

*Fosturtøkulóggávan í Føroyum*

Anne Mette Greve Klemensen, forkvinna í Etiska ráðnum, luttók í grein hjá DR um evnið, 17. juni. 2022
Tilvísingar til upptøkur og annað eru at finna á heimasíðuni hjá Etiska ráðnum, undir viðkomandi evni.

*Samrøða við fráfarindi forkvinnuna*

Anne Mette Greve Klemensen, forkvinna í Etiska ráðnum, í Degi og Viku í KvF 19. september 2022.

*Samrøða við nýggja formannin*

Bergur Debes Joensen, formaður í Etiska ráðnum, í Degi og Viku í KvF 07. oktober 2022.

## Fundarvirksemi

Etiska ráðið hevði 10 ráðsfundir í 2022, og fleiri fundir vórðu hildnir í arbeiðsbólkum. Á ráðsfundunum luttóku tveir gestir uttaneftir. Harafturat hevði Etiska ráðið havt fleiri fundir í sambandi við ráðstevnuna um vælferðartøkni og etikk, luttøkur á ráðstevnu um heilsu og fólk við menningartarni, og í fíggjarnevndini hjá Løgtinginum í sambandi við hoyring um Steno miðstøð í Føroyum.

### Luttøka uttanhýsis

Anne Mette Greve Klemensen, forkvinna, var tríggjar ferðir og helt fyrilestur vegna Etiska ráðið fyri røktarstarvsfólkum um umsorganaretikk, hevur vitjað GIGNI um etikk í sambandi við ráðgeving um fosturtøku, og verið á Skúlanum á Fløtum um banniorð og Etikk.

## Fyrisitingin

### Skrivstovuhøli

Etiska ráðið leigar framvegis í Smæruni, J.H. Schrøters gøtu 7, í Havn.

### Fíggjarstøða

Hóast tað í fíggjarlógaruppskotinum varð skotið upp at hækka játtanina til Etiska ráðið við 48.000 krónum, úr 672.000 krónur upp í 720.000 krónur, soleiðis at lagt varð upp fyri nýggjum leiguútreiðslum, tí Etiska ráðið fekk egin skrivstovuhøli, varð endin tann, at fíggjarnevndin skerdi játtanina 52.000 krónur, úr 672.000 krónur niður í 620.000 krónur. Við ársenda hevði Etiska ráðið brúkt 640.859 kr,-, ið er 20.859 kr,- ov nógv.

# Ætlanir 2023

Flestu nevndarlimirnir vórðu skiftir út í oktober 2022, og fakligi skrivari legði frá sær frá 31. desember. Tískil var tað við árslok 2022 ógreitt júst hvat ráðið fer at arbeiða við í 2023. Ráðið gjørdi av at hittast fyrst í 2023, at gera av hvørji evni tað fer at hava fokus á komandi tíðina. Ráðið var tó samt um, at skipa fyri ráðstevnu um fosturtøku í fyrri helvt av 2023.

# Samanumtøka

Etiska ráðið hevur verið virkið á ymsan hátt í 2022, í miðlunum, á heimasíðuni, á fundum og tiltøkum, sum hoyringarpartur og annað, og ráðið hevur lagt orku í arbeiðið við evninum raðfestingar í heilsuverkinum, sum úrslit fer at síggjast av í 2022 og frameftir.

Árið 2022 hevur verið nógv merkt av, at tað gekk rúm tíð áðrenn tað gjørdist greitt, hvørji nevndarlimir skuldu skiftast. Hetta gjørdi at ráðið var í eini bíðistøðu í fleiri mánaðir. Síðani hevur virksemið verið merkt av, at 7 av nýggju nevndarlimum vóru nýggir, og skuldu seta seg inn í, hvat Etiska ráðið arbeiðir við, og tað hevur eisini ávirkað virksemi móti endanum av árinum, at fakligi skrivarin legði frá sær.

ETISKA RÁÐIÐ

Talið 3 umboðar ávísa rútmu, - lívsins rútmu.
Byrjan – miðja – endi. Skapan – lív – deyði. Fortíð – nútíð – framtíð.

Etiska ráðið viðger evnir, har tað sum oftast ikki eru eintýtt svar og har evnir kunnu síggjast úr ymsum sjónarhornum. Soleiðis ímyndar búmerkið arbeiðið hjá Etiska ráðnum.